gult10 cyan10 magenta10 svart10



## VIÐMERKINGAR

# Reytt kort til varmakelduróðurin

**Vagnur Michelsen**



*(Av tí at onkur prentvilla var í greinini í blaðnum í gjár, prenta vit greinina umaftur)*

Í seinastuni hava nógv hundrað ungfólk verið til próvtøku, og fleiri teirra síggjast í gøtunum við studenta-, HF- ella HH-húgvum. Tey hava staðið eina roynd og fingið prógv.

Leygardagin var kappróður á Fuglafirði. Og høvdu persónarnir, sum stóðu fyri startinum verið til roynd í at leggja út startirnar og starta kappróðrarbátar, so høvdu viðkomandi ikki fingið »húgvuna« henda dagin. Tí avrikið í Fuglafirði leygardagin var út av lagi vánaligt, ella rættari sagt pínligt. 03 í karakteri fyri at leggja út fasta startin er hóskiligt.

Tað gongur ikki at geva streyminum skyldina, tí rák hevur allar tíðir verið millum oyggjarnar.

Kappróðurin skuldi byrja klokkan trý. Klokkan hálvum fimm vóru tríggir av róðrunum avgreiddir. Men so hendi tað, sum fyri alt í verðini ikki má henda. Roynt varð í hálvan annan tíma at flyta fasta startin frá 1000 metrum út á 1500 metrar. Hetta miseydnaðist og førdi til, at tað tók næstan fýra tímar at avgreiða kappróðurin á varmakeldu.

Á jóansøku tók tað tveir tímar at avgreiða róðrarnar.

Avrikið í Fuglafirði leygardagin er serliga ein háðan ímóti okkara róðrarfólki. Síggi fyri mær manningina á einum 10 mannafari koma rennandi oman til bátadráttin. Teir høvdu hitað upp og vóru klárir at fara í bátin. Genturnar høvdu júst róð, og nú var tíð hjá monnunum at fara í bátarnar og fyrireika seg til róðurin.

Menninir í 10 mannaførunum sótu í vátveðri og bíðaðu í tveir tímar í bátunum áðrenn teir sluppu at rógva. Tveir tímar eru meira enn ein heilur fótbóltsdystur, minnist til tað.

Manningarnar á seksmannaførunum við monnum bíðaðu í hálvan annan tíma úti á málinum.

Hetta er langt uttan fyri øll menniksja- og ítróttarlig mørk, sum kunnu bjóðast okkara rógvarum, sum venja fýra-fimm ferðir um vikuna og ganga við lív og sál upp í ítrottin.

Minsta krav til hvønn FM kappróður má vera:

1. At nýttir verða tveir fastir startir á hvørjari FM stevnu. Ein fastur startur skal liggja á 1000 metrum og ein startur á 1500 metrum, áðrenn bátarnir koma á róðrarøkið.

Tá ið róðrarnir á 1000 metrum eru avgreiddir, er longu klárt at fara út á 1500 metrar. Ímeðan róð verður 1500 metrar, verður 1000 metrastarturin fluttur út á 2000 metramálið. So einfalt er tað. Í Fuglafirði var bara tann eini fasti starturin.

2. At Róðrarsambandið hevur eina fasta manning, sum leggur út allar fastu startirnar á FM stevnunum. Hvussu í víðu verð skulu menn fáa royndir at leggja út startir, tá ið hetta í summum førum bert verður roynt annað ella triðja hvørt ár?

3. At Róðrarsambandið ásetur, hvussu langa tíð ein róður í mesta lagi kann vara, áðrenn ítróttarliga virðið er burtur. At sita vátur í einum báti og bíða í tveir tímar kann ikki góðtakast.

4. At hugsað verður um áskoðaran, sum hevur goldið 50 krónur at síggja kappróðurin. Nógvir áskoðarar fóru til húsa aftur leygardagin, og hvat er kapp-róður uttan áskoðarar?

# Heini og postmálið

**Jógvan á Lakjuni**



Formaðurin í Vinnunevndini hjá løgtinginum, Heini O. Heinesen, hevur í seinastuni fleiri ferðir í bløðunum og nú fríggjakvøldið í útvarpinum viðgjørt uppskotið um postvirksemi, sum ikki kom aftur úr Vinnunevndini, áðrenn tingið fór til hús. Av tí at Heini fer sera lætt um sannleikan og bara hevur hug at geva fólkafloksumboðunum í Vinnunevndini – og kanska serliga mær – skuldina fyri, at málið ikki kom aftur í tingið, kenni eg meg noyddan til at gera hesar fáu viðmerkingar.

Vinnunevndin fekk málið eftir 1. viðgerð í tinginum 1. feb. Tingið hevði sín síðsta fund 4. mai, og tað vil siga tað sama sum, at málið lá í nevndini í samfullar 3 mánaðir. Á fundum í nevndini 15. og 22. feb. vóru innkallingar í samband við málið, har m.a. Postfelagið og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, vóru og greiddu frá sínum sjónarmiðum. Eftir tað bleiv málið stórt sæð ikki viðgjørt. Hetta kann ein og hvør síggja við at hyggja í gerðabøkurnar hjá Vinnunevndini, sum eisini liggja á internetinum. Tað stóð á skránni til fleiri fundir, men er ikki viðgjørt, bara leysliga umrøtt eina ella tvær ferðir. Hví málið ikki bleiv viðgjørt, skal eg ikki fara at útgreina her, men tað var heilt týðiligt, at formaðurin ongan hug hevði at viðgera tað.

Ikki fyrrenn í tí vikuni, sum tingsetan skuldi enda, kom málið aftur á borðið, men nú var eingin tíð at viðgera tað. Eisini vóru fleiri spurningar, sum ikki vóru nóg væl greiddir. M.a. var komið fram, at fór málið ígjøgnum, sum tað var orðað, so fór tað at hava við sær, at posthús fóru at verða niðurløgd nógvastaðni, eisini á stórum plássum sum Toftum, Leirvík og Fuglafirði. Um nakað var í hesum, fingu vit ongantíð uppklárað, men sjálvandi kundi eg undir ongum umstøðum góðtaka hetta, og tí vildi eg – og tað vóru fleiri við mær – hava eina orðing inni í lógina, sum tryggjaði, at hetta ikki hendi. Tað vísti seg, at tíðin bleiv ov stutt til at gera eina skilagóða orðing, og menn vóru eisini ivasamir um onnur ting í sambandi við lógina. M. a. tí fór málið ikki aftur í tingið!

Eg haldi, at Heini O. Heinesen skal lata vera við at geva øðrum enn sær sjálvum skuldina fyri, at málið ikki kom aftur í tingið. Heini er formaður í vinnunevndini, og tað er hann, sum avger, hvørji mál verða sett á skránna og nær. Hann kundi hesar 3 mánaðirnar, málið lá í Vinnunevndini, havt prioterað tað hægri og viðgjørt tað gjøllari. So høvdu vit allarhelst havt funnið eina loysn.

# Boomerangurin hjá Jóannesi

**Sjúrður Skaale**



Sosialurin endurgevur týsdagin eina røðu hjá Jóannesi Eidesgaard, har hesin manar fram ta mynd, at javnaðarfólk verða forfylgd og jagstrað. Og so sigur hann, at “Seinasta dømi er, at tjóðveldispropagandain Fregnir sigur, at Javnaðarflokkurin vil lata dønum oljupengarnar. Hetta er lygn og er ongantíð sagt”.

Undirritaði tosaði mikudagin 13. juni við Jóannes Eidesgaard um, hvussu Javnaðarflokkurin í verki vil fremja sínar ætlanir um, at føroyingar, um vit fáa ráð til tað, skulu rinda danska statinum fyri ávís felagsmál.

Tað er púra rætt, at Jóannes undir samrøðuni ikki segði, at Javnaðarflokkurin “vil lata dønum oljupengarnar”. Hevði eg havt skrivað hetta, hevði tað, júst sum Jóannes sigur, verið lygn.

Men tað var ikki tað, sum stóð í Fregnum. Greinin var ein púra røtt og saklig endurgeving av eini samrøðu, har Jóannes Eidesgaard segði, at verður nógv olja funnin við Føroyar, er Javnaðarflokkurin sinnaður at nýta ein part av inntøkunum til at rinda fyri ymiskar tænastur, sum vit fáa frá danska statinum.

Í umrøddu røðu rættar Jóannes Eidesgaard Fregnir við hesum orðum:

“Oljuavtalan frá 1992 sigur, at fáa vit inntøkur frá einari oljuvinnu, so skal hetta føra til eina samráðing um lækking av ríkisstuðulinum. Og er tað ikki sjálvsagt. Tað, sum Javnaðarflokkurin harumframt hevur sagt, er, at tað er einki í vegin fyri, at hava vit ráð, so skulu vit gjalda fyri tær tænastur, sum danir gera fyri okkum í Danmark sum t.d. uttanríkispolitikk, verjupolitikk, útbúgvingar o.l.”

Tað var júst hetta, sum stóð í áðurnevndu grein í Fregnum.

Støðan er altso tann, at Jóannes Eidesgaard kastar mær fyri at hava skrivað nakað, sum eg ikki havi skrivað, fyri síðani at skíra meg lygnara fyri at hava skrivað tað.

Tá hann so skal rætta meg vísir hann til júst tað, sum eg havi skrivað.

So kunnu fólk sjálv meta um, hvør tað er, sum nýtir lygn og propaganda.

# Kvøða til Sólborg Dulavík

Eg og mong við mær kenna okkum á rillandi grund, nú tú leggur frá tær.

Mær kemur í hug eina gamla søgu um eitt ljós ið skein bjart fyri øllum, uttan sær sjálvum, tí tað stóð í stakanum.

Veitst tú av, at meginmálið við lívinum er ikki einaferð at blíva eitt stórt og gott menniskja, men at vera tað. Hetta skoðsmál skalt tú hava frá mær og mongum øðrum.

Tú hevur verið hin signandi hondin í tí bláa húsinum í mong ár og eg unni tær hjartaliga at tú fær eitt sindur meiri ró í framtíðini, men kenni eg teg rætt, so er hjarta títt eins brennandi, hvat tú so enn kemur at takast við, aftaná hetta starv sum tú nú leggur frá tær.

Í Lynggøtu arbeiddi tú í sonnum kristnum anda, sum mong hava kent fløgan av. Sjálvur Kristus segði ongantíð »Eg skel einaferð blíva« nei Hann var og er, til alla tíð hin sami, og sum skrivað er »Sama sinnalag veri í tykkum«.

Aldri havi kent fordøming har tú var, ei heldur vanvirðing.

Aldri havi eg hoyrt teg nevnt orðið tapara, men hvat skal ein vinnari gera, um ongin tapari er?

Men her er talan um mannalív og lagnir sum fá kunnu ímynda sær.

Hetta var títt lív í Lynggøtu og hetta verður helst eisini títt lív í framtíðini.

Takk er eitt so lítið orð, men tó so stórt, at tað aldri kann verða sagt í fullari rúmd.

Takk Sólborg og Jesus fylgi tær, sum altíð var tín heilsan.

Takk.

**Róland**

gult11 cyan11 magenta11 svart11



# Vil hava landsstýrismann at steðga uppsøgnum

**Føroya Postfelag heitir nú á Bjarna Djurholm, landsstýrismann í vinnumálum at steðga uppsøgnunum í Postverkinum**



*Postfelagið við hava landsstýrismannin at steðga fráboðaðu uppsøgnunum á Postverkinum. Limirnir í Postfelagnum kenna seg sum gíslar í einum politiskum spæli, og vilja greitt hava at vita, hvør ætlanin er við Postverkinum*

UPPSAGNIR

*Eirikur Lindenskov*

– Fráboðaðu uppsøgnirnar hjá postverkstjóranum eru við til at niðurbróta stovnin, Postverk Føroya.

Hetta sigur Postfelag Føroya í brævi, sum felagið hevur sent landsstýrismanninum í Vinnumálum, sum varðar av postverkinum.

Nevndin og limir í Føroya Postfelag heita í brævinum á landsstýrismannin um skjótast at steðga uppsagnunum, sum postverksstjórin hevur fráboðað.

Felagið heldur, at tað er lítið heiðurligt av landsins myndugleikum at fara soleiðis við starvsfólkum, sum hvønn dag royna at gera sítt besta.

– Vit kunnu ikki góðtaka, at limir okkara eru gíslar í einum politiskum spæli, sum er við at avmakta stovnin.

Tað hevði verið meira sømuligt av myndugleikunum at komið greitt fram og sagt, hvør meiningin er við postverkinum. Er ætlanin at taka av Postverkið? spyr felagið, sum heldur, at tað sær soleiðis út.

– So er at fáa hetta gjørt yvir eitt avtalað áramál, heldur felagið.

Hinvegin vísir felagið á, at um ætlanin er at varðveita Postverkið sum tænastustovn, so hevur Postfelagið fleiri ferðir víst á loysnir, sum tillaga starvsfólkatørvin í samsvar við nútímansgerð av stovninum.

– Vit standa við okkara avtalur og eru framhaldandi sinnað at koma við loysnum, sum kunnu skapa eitt Postverk, sum gagnar øllum landsins borgarum, sigur nevndin í Postfelag Føroya í brævðinum til Bjarna Djurholm, sum eisini er sent Anfinn Kallsberg, løgmanni, Karsten Hansen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, Heina O. Heinesen, formanni í vinnunevndini og øllum floksformonnunum.

Í nevndini í Postfelag Føroya sita Sunleiv Højgaard, formður, Agnar Bech, næstformaður, Hendrik Thomsen, kassameistari, Jákup Páll Mohr Mortensen og Elin Danielsen.

# Fundur um Landbúnaðarálitið

**Kári á Rógvi**

*Vegna stýrið í Føroya Óðalsfelag:*



Føroya Óðalsfelag fer mikukvøldið 4. juli at halda fund á Svangaskarði á Toftum.

Føroya Óðalsfelag heldur fundir um alt landið til tess at fáa greiðu á, hvat óðalsmenn, traðarmenn og smærri festarar halda um landbúnaðarálitið.

Í landbúnaðarálitinum er uppskot um lóg um búnaðarjørð. Tað uppskotið hevði ført við sær ognartøkur og eina øgiliga almenna umsiting av ognarjørðini, var tað samtykt. Serliga fellir tað óðalsmonnum fyri bróstið, at reglur um arvarætt, aldur, framleiðslu og áseyðaskipan verða smíðaðar uttan at fyrilit fyri eini so aldargamlari mentan sum óðalsmentanini.

Á Toftum fer óðalsfelagið eisini at viðgera støðuna hjá teimum smærru festarunum og hjá traðarmonnum.

Serliga í markatalsbygdunum Nesi og Oyndarfyrði eru rættiliga nógv smá festi, ofta eina mørk ella minni. Festarin situr við landsjørð, men rekur vanliga brúkið á júst sama hátt sum óðalsmenn. Jørðin er eitt ískoyti hjá húsarhaldinum, og ein mentunarberandi partur av lívi teirri. Hesi smáu festi hvørva so við og við eftir galdandi lóg um landsjørð. Landbúnaðarálitið tekur heldur ikki fyrilit fyri teimum smáu festunum og teirra týdningi fyri trivnaðin á bygd.

Nógvar leiðutraðir eru um alt landið. Hesar eru oftast tiknar av kongsjørðini. Tá so er, fella tær aftur til festið, tá traðarfólkini doyggja. Men, ofta hava bør teirra tá røkt trøðna í fleiri ár. Fyri nógv húsarhald kennist tað sum dyggur smeitur, at traðirnar verða tiknar frá teimum á henda hátt.

Óðalsfelagið heldur, at betri var, um smærru festarar og traðarfólk sluppu at keypa jørðina, heldur enn at myndugleikarnir taka hana frá teimum. Ein hálvmørk kann vera eitt vælsignilsi, tvær merkur ein kleppur um beinini. Í øllum førum er týðandi, at hava eina so liðiliga skipan sum gjørligt.

Fundurin á Toftum verður á Svangaskarði kl. 19:00 mikudagin 4. juli 2001.

# Kunna um oljuvinnu

OLJUVINNA

Felagið Transocean, sum eigur boripallin Sovereign Explorer, sum Statoil og Amerada Hess hava leigað til at bora eftir olju í summar, kemur til Føroya at vitja í morgin, hósdagin. Transocean fær allarhelst ein týðandi leiklut á oljuleikpallinum, verður olja funnin við Føroyar.

Í sambandi við vitjanina fer Asbjørn Olsen, marknaðarstjóri hjá Transocean, at hava framløgu um felagið, abeiðið hjá felagnum í Føroyum í dag og um arbeiðið í framtíðini, um olja verður funnin. Framløgan, sum verður í Glyvra skúla, verður fyri virkjum og myndugleikum, sum hava við oljuvinnu at gera.

# Tvey føroysk mentanarkvøld

MENTAN

*Eirikur Lindenskov*

Í ár verða tvey føroysk mentunarkvøld í Norðurlandahúsinum. Tað fyrsta verður fríggjakvøldið komandi kl hálvgum átta.

Á skránni hetta kvøldið verður tónleikur við Kára Sverrisson og fleiri. Havnarkórið fer at syngja, og Dansifelagið í Havn skipar fyri føroyskum dansi.

Eisini fara Vár Jacobsen og Páll Danielsen at framføra eitt sjónleikarabrot og yrkingar.

Framførslan verður á norðurlendskum.

# Ættirnar: 17 sangir til samanspæl

**Forlagið Lindin hevur givið út bók við 17 sangum, lagdir til rættis til skúlabrúk**

TÓNLEIKUR




*Kári Bæk hevur lagt til rættis løgini til samanspæl. Bókin er ætla tónleikaundirvísingini í fólkaskúlanum*

Ættirnar er eitt úrval av føroyskum, kendum og minni kendum, og týddum sangum. Av teimum 17 sangunum eru 13 uppruna føroyskir sangir, harav nakrir ikki hava staðið á prenti fyrr, meðan teir fýra eru týddir úr donskum. Summar av sangunum kenna vit frá bondum og fløgum.

Bókin er ætlað børnum í skúlaaldri, men fleiri av sangunum kunnu yngri børn og vaksin saktans eisini hava gleði av at sygnja.

Innihaldið spennir frá torvatrøllum til starar, fra sansum til at vera lítil ella stórur og frá kavaroki til hvalaveiðu í kolandi stormi.

Stílurin umfatar rokk, swing, kalypso umframt vanlig løg.

Til hvønn sangin er ein útseting fyri skúlaljóðføri,. ætlað til samanspæl í tónleikaundirísingini. Ljóðførini, hugsað verður um, eru fyrst og fremst rimaspøl: xylofon, metallofon, klokkuspæl, men sjálvandi ber til at nýta ljómborð og elbass eisini. Útskrivað klaverstemma er til hvønn sangin, so lærari ella næmingur kann spæla undir. Eisini verður blokkfloytan tikin í nýtslu í summum sangum. Aftast í bókini eru uppskot til fylgispæl á rytmuljóðførum.

Lagt til rættis Ættirnar hevur Kári Bæk. Permumynd og myndirnar annars í bókini hevur Heiðrikur á Heygum gjørt.